

TING-HELLAN

– So var skipskjansurin har til Jóannes Eidesgaard. Nú Lisbeth misti pappírini, var Eidesgaard einasti politiski skipsførari við fullum pappírum, sum samríkisreiðaríið hevði til taks, skrivar Kári á Rógvi m. a. í Tinghelluni í dag

# Tað er gaman at ganga saman

**Valúrslitið er bert ein partur av politisku landskappingini. Mest at siga hevur, hvørjir flokkar taka seg saman eftir valið**

**Kári á Rógvi**



So var skiparakjansurin har til Jóannes Eidesgaard. Sosialdemokratar í Norðanlondum kenna seg at eiga rættin at vera í stjórn, og flestu javnaðarformenn gerast eisini forsætisráðharrar. Í Føroyum hevur Javnaðarflokkurin tó ongantíð havt ta undirtøku, sum er vanlig í hinum skandinavisku londunum. Burtursæð frá Suðriar valdømi og á valinum í 1990, klárar Føroya Javnaðarflokkur ikki at tryggja sær tann triðingin av atkvøðunum, sum systrarnar regluliga fáa.

Tað er tí ikki sjálvsagt, at formaðurin á lista C gerst løgmaður. Men hóast tað, hava javnaðarformenn í Føroyum tó verið hegniðir júst til samgongukynstrið. Báðir Dam'arnir og Marita Petersen hava verið javnaðarløgmenn.

Nú Lisbeth misti pappírini, var Eidesgaard einasti politiski skipsførari við fullum pappírum, sum samríkisreiðaríið hevði til taks.

## Mynstringin

Var nakar sum ivaðist í, at stýrisskipan og vallógir í Føroyum eru eitt anilsi nørdasligar, so er bara at hyggja í regluna í stýrisskipanarlógini um formansumfarið ella lurta eftir prátinum um d'Hondt og Sainte-Lague.

Tað ber til at siga, at stýrisskipanarlógin sparir okkum tíð, tá hon setur eina røð av freistum fyri mynstringini av samgongu. Men afturímóti er tað nett sama stýrisskipanarlóg, sum gevur okkum val í heilum. Seinast val var, gekk eisini øgiliga long tíð við samgongusamráðinum, tí freistirnar í stýrisskipanini galda bert, um løgmaður er farin frá og er vorðin starvandi skipari á landsskútuni.

Í hesum liggur eisini tann óvanin, sum føroyskir politikarar hava at finna loysnir upp á allar spurningar nakrar fáar dagar eftir valið.

Samgonguskjølini seinni árini hava fyri ein part havt ov neyvar orðingar, og fyri ein part alt ov onkisigandi og almennar formuleringar. Tað fyrra bindur óneyðuga nógv, tað seinna gevur øllum pørtum møguleika at halda upp á sítt, tá samgongan - sum politisku náttúrlógirnar í Føroyum tykjast krevja - er farin at klandrast av álvara innanhýsis.

## Í góðari trúgv

Á enskum lógarmáli verður tosað um at samráðast í góðari trúgv. Hetta er støðan, tá tveir partar eru bundnir av tilsøgnum ella forpliktilsum av onkrum slagi, men ikki hava nakra neyva avtalu.

Tá verður tosað um skylduna at samráðast í góðari trúgv, og merkir tað, at partarnir hava skyldu at finna eina felags nýtiliga loysn. Royna teir at vera smartir og samráðast bert til egið gagn, kann tað vera at rætturin áleggur teimum tað, ið rætturin metir sum røttu avtaluna í góðari trúgv.

Okkum tørvar eina samgonguavtalu í góðari trúgv. Eina avtalu, ið greitt lýsir nøkur prinsipp at stýra eftir, nøkur høvuðsmál, sum skulu loysast, og síðani letur tað upp til áhaldandi samráðingar í góðari trúgv at finna neyvaru loysnirnar.

Fremsta uppgávan hjá komandi løgmanni verður í veruleikanum at lurta eftir samgongufeløgum sínum, seta seg nakað oman fyri tað flokspolitiska og síðani tryggja, at samgongusamskiftið verður áhaldandi í góðari trúgv.

Hetta ljóðar kanska ikki av so nógvum. Føroyingar finna jú út av tí bæði í feløgum, stýrum og á arbeiðsplássum. Men samgongur í Føroyum hava tað við at enda í samskifti í óndari trúgv.

Sera nógv fer at valdast, hvussu samgonguskjalið og samgongustevið verða skipað.

## Stavrím

Onki er vist enn við samgongubókstavum. ABC eru helst frammaliga í rúgvuni. Tað merkir hóvliga sjálvstýristilgongd, men javnaðarmonnum kann kanska fara at leingjast eftir úrslitum á vælferðarleið. Tí eru CEH ella serliga BCE samgongur, ið helst liggja vinstravonginum í javnaðinum nærri at hjarta.

Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin kundu saktans samst um nakrar ikki ov dýrar yvirtøkur, samst um at skrotta yvirtøkulóg og tvøroyarskjal, og samst um vælferð og varligar privatiseringar, samst um nýggja stýrisskipan. Hetta er helst tann snildasta samgongan, tá ræður um hjartamál hjá javnaðarflokkinum.

Yvirtøkuklassikarin ACE er eisini við í kappingini enn, men spenningar ímillum fólkfloks- og tjóðveldisfólk kunnu fylgja við í tað samlívið.

Tað ber ikki til at spáa, júst hvat fer at henda. Men tað ber til at siga nakað um sannlíkindi. Í løtuni liggur ABC við seks landsstýrismonnum nummar eitt, meðan BCE og ACE liggja stavn um stavn eina bátslong longri afturi.

## Kasserað varð sjálvstýrið ei

Táttayrkjarin segði á sinni, tá ið ACE-samgongan sat, at "kasserað var sjálvstýrið ei, nei tað sjálvt valdi andstøðuleið". Tað tykist sum hetta endurtekur seg. Sjálvstýrisflokkurin hevur síðani 1998 havt eitt forstáilsi við fólkaflokkin um, at teir halda saman, sleppur annar í samgongu, skal hin við.

Vit mugu gita, at so er ikki longur. Kári P. Højgaard vísti eisini á Jóannes Eidesgaard, og uttan so, at Jóannes velur eina BCDH-samgongu, er matematiskt ikki brúk fyri Kára Post.

## Gjógv ella gil

Men, hvør veit, kanska sleppa vit undan samgongugjónni hetta valskeiðið. Tí Jóannes Eidesgaard kundi svarað komplimentinum frá Kára aftur við at latið hann fingið formanssessin í eini løgtingsnevnd. Tað sama kundi verði við hinum foksleiðarunum, ið ikki sleppa upp í part.

Gita vit t.d. at ABC verður samgongan, so kundi Høgni Hoydal verði formaður í uttanlandsnevndini, Bill ella Jenis í Trivnaðarnevndini, og Kári Post í vinnunevndini.

Hetta hevði ikki verið samgongusiðvenja, men hetta hevði hóskað nógv betur til vanligan føroyska hugsunarhátt. Broytingar í rískisstøðuni eru hjartamálini hjá Høgna Hoydal. Frægasti møguleikin at fáa fulla semju í Føroyum - í øllum førum um tilgongdina heldur enn málið og endastøðina - er tí at taka klæna hoyvíkingin við upp á ráð frá byrjan, tá vit nú vita, at yvirtøkur av eitt nú kirkjuni, rættarskipanini umframt staðfesting av donsku virðingini fyri føroyskum sjálvræði, øll eru mál, sum semja kann fáast um.

Tað hevði verið ótrúliga spennandi at uppliva eitt løgting, sum kundi arbeitt líka so væl sum grundlógarnevndin gjørdi tað - og føroyingar flest gera tað - við samskifti og samráðing í góðari trúgv at náa til semjur heldur enn samtyktir.



# Skaðin kostar 10 mió krónur

**Norröna kemur ikki í sigling aftur fyrr enn 20. mars, tí tað tekur einar átta vikur at fáa nýggj skrúvubløð**

NORRONA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Bløðini á bakborðsskrúvu eru so illa farin, at tey kunn ikki umvælast. Tað tekur sjey til átta vikur at fáa nýggj bløð, og tí fer Norröna ikki í sigling aftur, fyrr enn 20. mars, segði Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, tá Sosialurin hitti hann í telefonini umborð á Norrönu, sum mánamorgunin var tikin upp í dokk hjá Blohm+Voss skipasmiðjuni í Hamburg.

– Stálskaðin verður umvældur beinanvegin. Tað arbeiðið verður helst liðugt í næstu viku, og so leggja teir skipið her at bíða eftir skrúvuni, sigur Óli Hammer.

Norröna skuldi eftir ætlan til garantieftirlit seinast í apríl, men hetta verður nú framkundað – og gjørt, meðan skipið kortini liggur í Hamburg.

Enn er ov tíðliga hjá teimum á Smyril Line at siga, hvat endaligi kostnaðurin verður av at umvæla skaðan, Norröna fekk, tá hon tríggjar ferðir bar við land í Havn 15. januar. Fyribils er skaðin mettur at kosta umleið 10 milliónir krónur.

Tryggingin tekur við øllum skaðan, men reiðaríið heftir fyri eina sjálvsábyrgd upp á 1,5 mió krónur. Harumframt er Smyril Line tryggjað móti intøkumissi.

(Petur Højgaard hjá Smyril Line tók myndirnar niðanfyri.)




*Norröna, tá hon var tikin upp í dokkinum hjá Blohm + Voss í Hamburg mánamorgunin*

*Mynd: Andreas Bock, Hamburg*



*Bakborðsskúrvaná Norrönu fekk stóran skaða, tá Norröna bar við Viðarnes í Havn 15. januar. Tað tekur upp í átta vikur at bíða eftir nýggjum skrúvubløðum – og tí verður Norröna liggjandi í Hamburg til 20. mars*



*Sýriborðsskrúvan slapp við skrekkinum… Meðan Norröna liggur í Hamburg og bíðar eftir nýggjum skrúvubløðum, verður garantiiðarbeiðið, suma nanrs skuldi verið gjørt seinast í apríl, gjørt, so skipið aftur kann far í regluliga sigling longu síðst í mars*



*Botnurin fekk eisini stóran skaða, tá Norröna bar við land. Teir eru longu farnir í holt við stálarbeiðið. Óli Hammer, stjóri á Smyril Line væntar, at hetta arbeiðið verður liðugt í næstu viku*



*Eitt av skaddu skrúvubløðunum á Norrönu. Bakborðsskrúvan fekk stóran skaða, tá skipið bar við land.*